Nr. 34 8. mars 2001

# Kunngerð

# um

# endurrindan av útreiðslum í sambandi við kolvetnisvirksemi

Við heimild í § 32, stk. 4, í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, verur ásett:

**§ 1.** Loyvishavarar, ið hava fingið loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, skulu endurrinda útreiðslur myndugleikin hevur í sambandi við viðgerð av málum um loyvi og góðkenning v.m., og av eftirlitinum við at lógin og reglur og treytir settar sambært lógini, verða hildnar.

*Stk. 2.* Loyvishavarar skulu endurrinda útreiðslur myndugleikin hevur av kanningum, ráðgevaraveitingum, heruppí tænastum frá øðrum myndugleikum, tænastuferðum v.m.

**§ 2.** Gjaldið, ið skal rindast myndugleikanum eftir § 1, stk. 1, verður ásett við støði í einari uppgerð yvir tímatalið, ið nýtt er til viðgerðina og eftirlitið. Tímagjaldið er 740 krónur.

*Stk. 2.* Útreiðslur, sum myndugleikin hevur eftir § 1, stk. 2, skulu endurrindast eftir rokning.

**§ 3.** Oljumálastýrið fyriskipar uppkrevjingina av gjøldunum.

*Stk. 2.* Gjøldini skulu rindast í seinasta lagi tann 25. í mánaðinum eftir, at tey eru uppkravd.

*Stk. 3.* Verða uppkravd gjøld ikki goldin rættstundis, verður renta roknað samsvarandi ta til hvørja tíð galdandi rentu sambært § 5 í rentulógini.

**§ 4.** Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Oljumálastýrið, 8. mars 2001

**Eyðun Elttør (sign.)**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen (sign.)